

Jógvan Arge, varaborgarstjóri í Tórshavnar kommunu tekur her ímóti borgarstjóranum í Aberdeen, George Adam á altjóða oljumesssuni í Aberdeen, har hann vitjaði føroyska básin. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Rætt at Føroyar vísa andlit á oljumessu

**Jan Müller**

10.09.2015 - 12:03

Oljan.fo

Aberdeen, 10. september.

Hóast tað eru niðurgangstíðir í oljuvinnuni, so heldur varaborgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jógvan Arge, at Føroyar eiga at vera á staðnum, tvs. á altjóða oljumessuni í Aberdeen.

Jógvan Arge, varaborgarstjóri í Tórshavnar kommunu er saman við formanninum í vinnunevndini, Sjúrða Olsen og havnameistaranum, Jónsvein Lamhauge, við á oljumessuni í Aberdeen hesa vikuna.

"Eg var eisini í Aberdeen fyri tveimum árum síðani, og tað er greitt, at tað er nógv hent í hesi vinnuni síðani tá. Ikki minst síggja vit avleiðingarnar av tí lága oljuprísinum, nú færri luttakarar eru á framsýningini og færri fólk síggjast vitja. Men fyri okkum í Tórshavnar kommunu vilja vit sum høvuðsstaður gjarna fylgja við, hvat fer fram á altjóða pallinum og royna vit alla tíðina at vera

tilreiðar at taka ímóti tí virksemi, sum mátti verið í hesi vinnuni," sigur Jógvan Arge og vísir á, at oljuskip av ymsum slag koma javnan á Havnina at skifta manning, bunkra, proviantera og fáa umvælingar gjørdar. Hetta krevur sjálvandi, at Havnin sum nútímans høvuðsstaður hevur facilitetir og umstøður at taka ímóti hesum fólkunum. Her er so bæði talan um góðar havnaumstøður, góð gistingarhús osfr.

"Havi merkt mær, at vánirnar í oljuvinnuni eru vornar verri og verri vegna lágu prísirnar, men kortini má eg siga, at her kortini er so mikið stór undirtøka og so nógvur aktivitetur, at hetta gevur einum vón um, at tað fer at ganga hin vegin aftur. Soleiðis skilji eg eisini tey mongu, sum vitja okkara bás, og tá vit leggja leiðina inn á aðrar básar á messuni."

Jógvan Arge minnist sjálvur sum tíðindamaður, hvussu stóran áhuga føroyingar hava víst skiftandi oljumessunum í Stavanger og Aberdeen gjøgnum øll hesi seinastu 25 árini. Hóast einki lønandi oljufund enn er gjørt í Føroyum, so heldur varaborgarstjórin tað vera gott at síggja, hvussu føroysk vinna hevur ment seg á økinum. Hann heldur tað tí vera sera skilagott av Føroyum at luttaka á slíkari messu.

"Tað verður kanska einaferð, at oljan verður funnin í Føroyum. Vit skulu so eisini røkja áhugamálini hjá teimum, sum arbeiða í oljuvinnuni. Á hesi oljumessuni førir eisini Oljuvinnufelagið fram sjónarmiðið um eina sentrala havn í Norðurhøvum, í Føroyum og gera Føroyar til part av tí nýggju ferðsluni, sum er við at taka seg upp. Hetta er eisini ein boðskapur, sum er relevantur fyri eina messu sum hesa. So eg haldi vit eiga at vera í nánd og hava eygu og oyru opin, soleiðis at vit fáa tað burtur úr vit kunnu og vera klárir til at taka tey stig, sum mugu takast fyri at røkka longuri."

Jógvan Arge heldur tað ikki vera løgið, at umboð fyri ikki minni enn fýra føroyskar kommunur eru tilsteðar á messuni í Aberdeen.

"Tað kann bara vera gott, at so nógvar kommunur vísa hesum møguleikunum ans. Tað sigur tvørturímóti nakað um tann áhugan kommunurnar hava fyri síni framtíð."

Hvussu sær Jógvan Arge so hansara egnu kommunu í oljuvinnuni. Hann sigur, at hetta var kanska meira umrøtt fyri 10 árum síðani, tá oljuleitingin tók seg upp av álvara, men tað er greitt, at henda vinnan fer at fáa týdning fyri Havnina og fara tað eisini at verða sett krøv til høvuðsstaðin, um so er, at ein oljuvinna fer at taka seg upp við Føroyar. So hann ivast ikki í, at henda vinna kann fáa stóran týdning fyri Tórshavnar kommunu sum frálíður men júst hvønn týdning torir hann ikki at siga. Tað eru jú fleiri kommunur um boðið og kappast verður millum hesar.

"Men rætt er at vera við á messum sum hesari. Tað vildi avgjørt verið skeivt at goymt seg burtur."

